LM-097/2020

Kommunufelagið

R. C. Effersøes gøta 30
Telefon +298 302480
Telefaks +298 302481
kf@kf.fo
www.kf.fo

Fylgiskjal 9

Fíggjarmálaráðið

17. februar 2021

Hoyringarsvar í sambandi við uppskot um at leggja saman Búskaparráðið og Landsbankan

Kommunufelagið fekk uppskotini til ummælis seint seinnapartin tann 3. februar við freist til 15. februar. Tað vil siga, at freistin var ikki longur enn eina góða viku - 7 gerandisdagar. Neyðugt er tí enn einaferð at gera vart við, at Lógartænastan hjá Løgmanskrivstovuni í rundskrivi hevur ásett, at ummælisfreistin til lógarbroytingar eigur ikki at vera styttri enn 4 vikur.

Fyri at tryggja, at Kommunufelagið kann viðgera lógaruppskot bæði fakliga og politiskt, eigur hoyringsfreistin ikki at verða styttri enn 4 víkur – tó helst 6 vikur. Stýrið í kommunufelagnum hevði í hesum føri ongan møguleika fyri at viðgera uppskotið innanfyri ásettu freistina. Kommunufelagið heitti tí á Fíggjarmálaráðið um at leingja freistina 2 dagar, so málið kundi viðgerast á einum (framskundaðum) fundi í Stýrinum tann 17. februar. Fleiri dagar seinni kom svar, har umbønin varð noktað uttan grundgeving. Framferðin tykist undarlig, tí talan er ikki um broytingar, sum hava nakran skund. Búskaparráðið hevur virkað síðan 1962 og Landsbankin síðan 1978. Men nú skulu hesir óheftu stovnar meira ella minni avtakast í skundi, uttan at kommunurnar, sum eru kjarnin í føroyska fólkaræðinum, fáa sagt sína hugsan.

Landsstýrið mælir til, at nevndin fyri landsbankan verður minkað úr 7 niður í 3 fólk. Nýggja 3-manna nevndin skal síðan virka sum bæði landsbankanevnd og búskaparráð. Í uppskotinum verður gjørt nógv burturúr at vísa á, hvussu skynsamt tað er við 3-mannanevndum. Sum besta dømi um hetta, verður víst til Bústaðir, sum hevur stýri við 3 limum. Her vil Kommunufelagið minna á, at uppskot er til viðgerðar í Løgtinginum – frá sama landsstýrið – har mælt verður til at víðka nevndina í Bústøðum úr 3 upp í 5 fólk!

Eisini verður mælt til, at ein og hvør, sum landsstýrismaðurin heitir á, kann koma við uppskoti til nevndarlimir í nýggju landsbankanevndini, ið eisini verður búskaparráð. Í lógaruppskotinum verða nevnd m.a. Felagið Peningastovnar og Føroya Arbeiðsgevarafelag sum dømi um, hvør kann koma við uppskotið. Kommunufelagið – sum í dag útnevnir ein lim í landsbankanevndina – verður als ikki nevnt. Tað er undrunarvert at mæla til at seta umboð fyri búskaparlig seráhugamál at manna eina nevnd, sum bæði skal virka sum nevnd fyri fíggjarstovn landsins og sum búskaparáð. Onki verður heldur sagt um fakligheit. Tað tykist sum einhvør kann verða limur í nýggju nevndini. Galdandi lóggáva setur greið faklig krøv til limirnar í landsbankanevndini og til Búskaparráðið. Men við broytingini ber væl til at manna eitt búskaparráð uttan nakran búskaparfrøðing yvirhøvur!

LM-097/2020

Kommunufelagið

R. C. Effersøes gøta 30
Telefon +298 302480
Telefaks +298 302481
kf@kf.fo
www.kf.fo

Serliga undarligt tykist tað, at tað í lógaruppskotunum onki verður sagt um, at nú verða tvær óheftar nevndir lagdar saman til eina nevnd, sum als ikki kann sigast at verða óheft. Onki verður sagt um nakra armslongd millum nevnd og landsstýrismannin yvirhøvur. Tað tykist bara sjálvsagt, at seráhugamál, sum landstýrismaðurin ynskir skulu umboðast, koma at virka sum búskaparáð, umframt at tey hava evstu ábyrgd av landsins lántøku og fíggjarligum støðufesti í landinum.

Landsbankin er stovnur undir landinum, og hava kommunurnar tí ikki stórvegis viðmerkingar til hvussu hesin verður skipaður. Men kommunurnar ynskja, at Føroyar, eins og øll onnur framkomin lond, hava eitt óheft búskaparráð. Kommunurnar eru ein stórur og vaksandi partur av føroyska búskapinum, og Búskaparáðið hevur eina týdningarmikla uppgávu í føroyska samfelagnum. Tað er neyðugt við einum óheftum stovni, sum á reint fakligum grundarlag kann viðgera samlaða føroyska búskapin í síni heild. Henda uppgávan kann ikki áleggjast nevndini fyri fíggjarstovn landsins. Tað ber ikki til, at sama nevnd sum skal vísa á veikleikar og skeivleikar í føroyska búskapinum fyrrapartin, skal selja lánsbrøv við trygd í sama búskapi seinnapartin. Har eru mótstríðandi áhugamál, og tað oyðileggur trúvirðið. At somu persónar harumframt kunnu umboða øll møgulig onnur seráhugamál ger bara ilt verri.

Vegna Kommunufelagið

Heðin Mortensen
Formaður

Eyðun Christiansen
Stjóri